# Føroyskir næmingar heimaftur úr Aberdeen

ÚTBÚGVING OG OLJA
*Jan Müller*

Í gjár komu 16 næmingar frá teknisku skúlunum í landinum heimaftur av eini væleydnaðari vitjan í Skotlandi. Teir hava síðani 26. november verið gestir hjá Aberdeen College og ASSET-útbúgvingarstovninum í býnum. Press and Journal skriva um vitjanini í leygardagsútgávuni. Blaðið skrivar, at eingin av næmingunum hevur serligar royndir í oljuvinnuni, og tí varð tað eitt kærkomið høvi hjá útbúgvingarstovnum og vinnuni í Aberdeen at vísa teimum nakað av tí, sum 30 ára royndir innan olju- og gassvinnu hava lagt eftir seg í Skotlandi. Sam Zacha, stjóri í ASSET-stovninum og sum hevur verið við til at fyrireika ferðina, sigur við blaðið, at tað er at fegnast um, at føroyingar, sum eru við at fara inn í oljuvinnuni, síggja teir møguleikar, sum Aberdeen hevur at geva teimum í samband við útbúgving og upplæring.



*Nakrir av teimum 16 næmingunum frá teknisku skúlunum, sum hava verið á kunningarferð í Skotlandi*

Vitjanin í Skotlandi kom í lag eftir at umboð fyri Aberdeen City Council vitjaði í Føroyum fyrr í ár. Tá varð avrátt, at 10 næmingar frá teknisku skúlunum skulu fara til Aberdeen, men tað vísti seg, at 16 vildu sleppa við, og endin varð, at allir sluppu við. Mentamálastýrið hevur stuðlað tiltakinum.

Tað er Oljuútbúgvingarsamtakið, sum er við til at skipa fyri slíkum. Tað arbeiðir so eisini við eini ætlan um fyrst í komandi ári at senda nakrar FHS-/HH-næmingar eina viku til Aberdeen College. Næmingarnir skulu við at fara í skrivstovuvenjing á skúlanum læra, hvussu arbeitt verður á einari skrivstovu í Skotlandi. Á henda hátt fáa teir kunnleika bæði til mannagongdir og til enskt skrivstovumál.

Teknisku skúlarnir hava annars tosað um møguleikan at senda lærlingar eina viku til Aberdeen sigur Claus Reistrup, sum stendur á odda fyri Oljuútbúgvingarsamtakinum. Tá verður hugsað um upplæring á verkstaði við atliti til amboð, sum verða nýtt í oljuvinnuni. Hugsast kann at fleiri fyritøkur, sum hava elø, maskin- ella smiðjulærlingar, kundu hugsað sær henda møguleikan fyri at geva lærlingunum eins og fyritøkunum kunnleika um tøkni/amboð innan oljuvinnuna.

Oljuútbúgvingarsamtakið hevur í sínum arbeiði lagt stóran dent á at samstarva við skúlar í øðrum londum.

## AFEN ráðstevna í Edinburgh

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

4.-5. december verður ein AFEN ráðstevna hildin í Edinburgh. AFEN er ein stytting av Atlantic Frontier Enviromental Network og sum er fíggjað og stuðlað av teimum oljufeløgum sum einahelst hava áhuga í oljuframleiðslu vestan fyri Hetland, umframt at kenda UKOOA, samtakið av bretskum oljufeløgum, eisini er sponsorur.

Á hesari ráðstevnuni verða heitini "Managing the Resources of the Atlantic Margin" og "A Sustainable Future?" Hópur av fyrilestrum verða hildnir um oceanagrafi, plankton, fiskastovnar, sjófuglar, fiskivinnuna, OSPAR og so sjálvandi um olju og gas.

Øll oljufeløgini, sum hava leitiloyvi á føroyaøkinum, hava umboð í FOIB Umhvørvisbólkinum og luttaka hesi. Luttakandi føroyingarnir eru frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Biofar, øðrum almennum stovnum umframt ANADARKO.

Mett verður at henda ráðstevna er sera relevant fyri Føroyar ikki minst eftir at olja er funnin og at vit nú stevna ímóti einari olju og gasframleiðslu á okkara øki.

## Ongar tekningar aftur í ár

Vegna forfall verða ongar tekningar á baksíðuni tað, ið eftir er av árinum.

Annars kemur 13. bókini við tekningum hjá Óla P í handlarnar fyrsta dagin.

**Blaðstjórin**

### VIÐMERKINGAR

## Koyrilin yvir Kollafjørð

**Jónas Johnsson**



**80 børn, familjur og dagrøktarar eru gíslar**

Býráðslimir søgdu á borgarafundi 22.10.01, at teir vilja javnstillað øll í kommununi. Men tað er ein andsøgn, tí limir í Kollafjarðar Arabeiðarafelag verða ikki javnstillaðir.

Teir fáa ikki síni arbeiðsviðurskifti avtalað, sum natúrligt er, við teirra egna felag. Hetta hildu dagrøktararnir í Kollafirði av góðum grundum vera í ljósmála.

Og hvat viðvíkir innihaldinum í einum ynsktum sáttmála, er fordømið greitt góðtikið við virknu luttøkuni frá Tórshavnar kommunu til tann fyrsta sáttmálan, ið fór úr gildi á nýggjárinum. Teir luttóku aktivt undir tinginganum í Kollafirði seinasta heyst! Einki kom óvart á teir. Stjórin á lønardeildini í Tórshavnar kommunu luttók, kravdi og góðtók. Einki annað er hvørki tá ella síðani ført fram, annað enn at roynast skuldi at fáa ein og sama sáttmálan fyri allar dagrøktararnar í kommununi aftaná nýggjár. Tað vil siga fyri 10 mánaðum síðani!

Hugskotið um tann eina og sama sáttmálan hava og høvdu kollfirðingarnir einki ímóti, bara hann verður góður og skikkaður fyri øll – herundir skilst sjálvandi, at økir við serligum fyritreytum og rímiligum ynskjum eisini verða vird. Og sjálvandi eisini, at sáttmálin verður til á ein demokratiskan hátt. Tað vil siga at allir dagrøktarar við feløgum sínum sum umboð, kunnu verða við til realitetstingingar. Men í so máta er einki gjørt frá Tórshavnar Kommunu. Tvørturímóti tingast hon nú við eitt felag, sum bert umboðar ein part av dagrøktarunum í kommununi.





*Carita Bjørklund sigur, at tað gongur framá við samráðingunum millum pedagogarnar øðrumegin og fíggjarmálastýrið og kommunurnar hinumegin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gongur framá við samráðingunum

**Verkfallið hjá pedagogunum fer í dag inn í sína triðju viku. Samráðingar hava verið um vikuskiftið, og tað gongur framá, skilst á formanninum í Føroya Pedagogfelag**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

– Tað tykist sum báðir partar nú tosa sama tungumál, og vit hóma ein glotta fyri framman, sigur Carita Bjørklund, formaður í Føroya Pedagogfelag, hvørs limir ikki hava verið til arbeiðis í tvær vikur.

Hon vónar, at verkfallið fær sín enda í hesi vikuni, men hon torir tó ikki at vænta hetta. Tá Sosialurin hevði hana í telefonini mánamorgunin, var tað nakað tíðliga hjá henni at úttala seg um samráðingarnar, ið høvdu verið mánadagin, men nøkur úrslit vóru fingin í samráðingunum, ið hava verið um vikuskiftið.

**Samdir um grundarlag**

Partarnir eru komnir ásamt um útrokningargrundalagið undir lønartalvuni, ið higartil hevur ligið í buktini. Carita metir ikki, at lønartalvan er tann stóri knúturin longur. Lønartalvan við bæði tænastumonnum og pedagogum er at kalla liðug, men enn vantar nakað í.

Eftir er so at samráðast um restina av sáttmálanum. Her eru eitt nú dagrøktarleiðararnir ikki fingnir uppá pláss.

Carita Bjørklund leggur tó dent á, at tað enn var nakað tíðliga at gera nakra niðurstøðu, tí partarnir vóru mitt í samráðingunum.

Carita Bjørklund gjørdist fimmti ára gomul sunnudagin, og hon kundi ikki ynskt sær eina betri føðingardagsgávu enn eina semju. Kanska fær hon eina seinkaða føðingardagsgávu í hesi vikuni.

# Boðsendi sjúkrabili uttan orsøk

**Leygarmorgunin fóru portørar í skundi norður til Hvalvíkar, tí ein maður hevði boðað frá, at hann var illa staddur. Hetta vísti seg tó at vera falskur alarmur**

FRÁBOÐAN
*Stefan í Skorini*

Leygardagin boðaði ein maður alarmsentralinum frá, at hann var illa fyri, lá á gólvinum og at honum tørvaði hjálp í stundini. Hann boðsendi tí sjúkrabilinum at koma á staðið og hjálpa sær. Talan var um ein miðaldrandi mann um fjøruti ára aldur, sum gev hesi boð.

Portørarnir fóru beinanvegin norður til Hvalvíkar at kanna málið. Tá teir komu til bygdina, varnaðust teir, at einki var galið við manninum.

Tí kom løgreglan eisini á staðið, og maðurin varð handtikin. Tá hann gjørdist edrúur aftur, varð hann avhoyrdur. Hann hevur viðgingið seg sekan í at boðsenda sjúkrabili uttan orsøk.

Hann er skuldsettur og kann vænta sær eina lutfalsliga stóra bót fyri gerðina. Maðurin var dýrandi fullur, tá hann ringdi eftir hjálp, og hann uppgav skeivt navn og telefonnummar.

**Í kirkju á nátt**

Leygarnáttina fekk løgreglan fráboðan um, at høvuðsdyrnar í Vesturkirkjuni stóðu á víðan vegg, og at fólk var inni.

Løgreglan fór á staðið og har vóru fleiri ungfólk inni í gongini. Dyrnar stóðu ólæstar, og tey vóru tí farin inn, og har høvdu tey tveitt sálmabøkur um alt gólvið. Tey sluppu við eini ávaring, og onkur kom at læsa dyrnar í kirkjuni.

Somu nátt var innbrot í einum sethúsum í Hoyvík. Tveir ávirkaður menn høvdu brotið inn og lagt seg at sova í húsinum. Teir vórðu handtiknir og eru skuldsettir.

## Stolin skutari

STULDUR
Stefan í Skorini

Sunnudagin seinnapartin hevur onkur, ið var staddur uppi Millum Gilja, havt tørv á flutningi. Viðkomandi stjól ein skutara úr einum bilhúsi, ið stóð opið.

Á veg omaneftir Flatarvegnum fer skutarin útav vegnum, og hann ferí knús. Tjóvurin tekur tó til rýmingar beinanvegin, og løgreglan hevur ikki fingið fatur í viðkomandi.

Løgreglan hevur tikið tríggjar bilførarar, ið koyrdu við kenning, um vikuskiftið. Ein varð tikin í fríggjanáttina, meðan hinir báðir komu í klørnar hjá løgregluni náttina eftir.

Sunnukvøldið var eisini innbrot í næmingaheiminum við Marknagilsvegin. Gerningsmenninir hava brotið høvuðsdyrnar upp og hava tikið 500 krónur, ið lógu óvardar í einum pengakassa í bygninginum.

## Herverk á Sandi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið var veitsla í ungmannafelagshúsinum á Sandi. Út ímóti morgni var neyðugt at boðsenda løgregluni, tí onkur varð blivin illur í brennivíni.

Viðkomandi hevði knúst fleiri rútar í húsinum, og løgreglan kom á staðið. Men tá var gerningsmaðurin sloppin til rýmingar.

Løgreglan veit tó, hvør hevur framt herverkið, men enn er ikki vist, um viðkomandi verður tikin, ella um hann sleppur við at lata eigaranum endurgjald.

## Innbrot á Giljanesi

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina varð brotið inn í ítróttarhøllina á Giljanesi í Vágunum. Gerningsmenninir hava brotið hurðina aftanfyri við einum stórum steini.

Síðani eru teir farnir beinleiðis í kioskina í høllini. Har hava teir brotið ein rút og hava sloppið sær inn. Har var tó eingin peningur at taka, og tí fór tjóvurin tómhentur avstað aftur. Eingi tekin eru um, at nakað er tikið.

Umframt hetta innbrotið fekk løgreglan eisini fráboðan um stormskaðar sunnudagin, tá nógvur vindurin var.

Nakrar takplátur á bygninginum, har Miðvágs skúli og bygdarhúsið eru, loysnaðu. Sløkkiliðið varð boðsent og festi pláturnar aftur. Aðrir smáskaðar stóðust eisini av vindinum.

## Nýggjur nevndarlimur í Blaðmannafelagnum

AÐALFUNDUR
*Stefan í Skorini*

Blaðmannafelagið hevði eykaaðalfund leygardagin. Á skránni var val av nýggjum nevndarlimum. Dánjal Højgaard, ið starvast á Dimmalætting, varð valdur í fakfelagsdeildina í nevndini. Hann kemur fyri Eli Guttesen, sum ikki kann vera í nevndini longur. Leif Láadal av Dimmalætting varð valdur til tiltakslim.

Katrin Petersen úr Sjónvarpi Føroya heldur fram í áhugadeildini í nevndini og tiltakslimur gjørdist Bjørt Samuelsen, ið starvast í Útvarpi Føroya. Jústinus Eidesgaard av Sosialinum er framvegis formaður í felagnum.